Fáa frið at sigla við ferðafólki

Fakfeløg fara ikki at steðga sínum limum, sum sigla um firðir og sund við ferðafólkum ímeðan Skipara- og Navigatørfelagið er í verkfalli

VERKFALL
Áki Bertholdsen

Eins deyð, annans breyð! Endarnir á strandfaraskipunum vóru ikki meiri enn bundnir, so loystu tíggjatals smábátar at sigla við fólki. Og tað fáa teir frið til,tí fakfeløgini hjá teimum ætla ikki at nokta teimum at sigla við fólki

Í somu løtu, sum Skipara- og Navigatørfelagið lýsti verkfall á miðdegi hósdagin, vóru tað tíggjutals smábátar, sum longu vóru til reiðar at loysa frá landi at sigla við ferðafólki.

Ikki minst um Vestmannasund og Leirvíksfjørð er ógvuliga lívligt av smábátum, sum sigla aftur og við ferðafólki, men eisini um Skopunarfjørð og um Suðuroyarfjørð sigla skip.

Samstundis sum hetta eru góðir dagar hjá nógvum av teimum, sum eiga hesar smábátar, máar hetta eisini støðið undan sjálvum verkfallinum og tekur broddin av tí.

Men fakfeløg, sum hesir menn eru í, ætla ikki at gera nakað fyri at steðga siglingini.

Fleiri av monnunum, sum sigla, eru limir í útróðrarfeløgum, Fiskimannafelagnum og í Maskinmeistarafelagnum.

Men ongi av hesum feløgum ætla at taka stig til at steðga siglingini.

– Eru teir, sum sigla, limir í Fiskimannafelagnum, er tað ikki sum fiskimenn, at teir sigla við ferðafólki, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum.

Hann sigur, at Fiskimannafelagið kann bara leggja seg út, hvat menninr gera í teirra eginleika sum fiskimenn.

– Hvat teir gera í sínari frítíð, ímeðan teir eru í landi, kunnu vit ikki leggja okkum í, sigur fiskimannafelagsformaðurin.

Auðunn Konráðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at felagið fer avgjørt ikki at leggja seg út í siglingina við privatbátum.

Hann sigur, at verkfallið kemur ógvuliga tvørt við hjá útróðrarmonnum, tí tað nú er tað nógv tvørligari at sleppa av við fiskin og av tí sama eru prísirnir munandi lækkaðir. Hetta kemst av, at virkini eru varnari við at taka ímóti fiskinum, tí tað er so ótrygt, hvussu tey sleppa av við hann aftur.

– Eg veit ikki um okkara limir hava so stóran samhuga við verkfallinum, hóast vit avgjørt halda, at navigatørarnir skulu hava virðiliga løn.

Annars heldur hann, at tað eru teir fægstu, sum eru limir í Meginfelag Útróðrarmanna, tí teir flestu eru frítíðarfiskarar og stuttleikabátar.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Maskinmeistarafelagnum, tí tey sótu í samráðingum og vóru ikki at fáa fatur á.

Men á skrivstovuni verður upplýst, at felagið hevur ikki tikið stig til at leggja seg út í siglingina.

Feløgini eru tó samd um, at sannlíkindi fyri, at fiskimenn, útróðrarmenn og maskinmeistarar fara á brúnna, eru lítlar og tí tí tey ikki at sígggja hetta sum tann stóra trupulleikan hjá teirra feløgum.

Eisini Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, ásannar, at tað verður trupult at steðga siglingini við smábátum.

– Tað makta vit ikki, sjálvt um vit høvdu viljað, sigur Ellintur Abrahamsen. Hann heldur tó, at verkfallið rakar meint, hóast smábátar sigla.

– Tað rakar vinnuna meint, tí tað er trupult at flyta fisk og annað í samband við vinnulív. Og tað rakar Suðuroynna meint, tí har er lítil og ongin flutningur til og frá.

Strandferðslan tekur ikki ábyrgd av sjúkraflutning

Á miðdegi í gjár boðaði Strandferðslan Landssjúkrahúsinum frá, at hon ikki longur kann taka ábyrgdina av sjúkraflutninginum um Vestmannasund og um Skopunarfjørð

VERKFALL
Áki Bertholdsen

Strandferðslan kann ikki longur taka ábyrgdina av sjúkraflutninginum um Vestmannasund og um Skopunarfjørð.

Hetta boðaði Strandferðslan Landssjúkrahúsinum frá á miðdegi i gjár. Somuleiðis hevur Vinnumálastýrið, Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið fingið hesi boðini.

Boðini koma í kjalarvørrinum á ísemjuni, sum hevur tikið seg upp um hvørja løn, yvirmenninir á Teistanum og Ternuni skulu hava fyri at vera tøkir til sjúkraflutning. (sí aðra grein í blaðnum).

– Vit hava gjørt hetta, tí vit hava fingið greitt at vita frá Fíggjarmálastýrinum, at menninir fáa ikki løn, so leingi teir eru í verkfalli, sigur strandferðslustórin, Reidar Nónfjall.

Ellintur Abrahamsen sigur, at hetta broytir á ongan hátt støðuna, sum hann hevur greitt frá í aðrari grein.

– Hvat Strandferðslan ger, kemur ikki okkum við. Vit hava ikki lýst verkfall fyri sjúkraflutning og tí eru menninir tøkir til tað og tað skulu teir hava løn fyri. Fáa teir ikki tað, fara vit at krevja lønina aðrar vegir, sigur Ellintur Abrahamsen, sum eisini sigur seg hava eina løgfrøðiliga meting av, at teir hava grein í sínum máli.

Sigla til teir verða koyrdir í land

– So leingi, menninir umborð á Teistanum og Ternuni ikki beinleiðis verða koyrdir í land, eru teir til reiðar at røkja sjúkraflutning um Skopunarfjørð og Vestmannasund, sigur Skipara- og Navigatørfelagið

VERKFALL
Áki Bertholdsen

Enn hevur verkfallið ikki rakt sjúkraflutningin og hann er í tryggum hondum so leingi, strandferðslan ikki beinleiðis koyrir menninar í land, sigur Ellintur Abrahamsen

– Verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum hevur ikki rakt sjúkraflutningin um Vestmannasund og um Skopunarfjørð. Og so leingi menninir á Teistanum og Ternuni ikki beinleiðis verða koyrdir í land, verður sjúkraflutningurin ikki raktur.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at tað er ein stór misskiljing, tá ið fólk halda, at Skipara- og Navigatørfelagið eisini ætlar at leggja sjúkraflutningin lamnan.

Umframt at vera ferðamannaskip, røkja Teistin og Ternan eisini sjukraflutning um ávikavist Skopunarfjørð og Vestmannasund.

Og sunnunudagin kom fram, at hesin flutningur nú var í vanda, tí at ósemja er um, hvussu nógv yvirmenninir á bátunum báðum skulu hava í løn fyri at røkja sjúkraflutningin.

Fíggjarmálastýrið heldur, at teir skulu hava gjald fyri tilkallivakt, sum er 17 krónur um tíman vanligar dagar og 34 krónur um tímar vikuskiftini og heilidagar.

Skipara- og Navigatørfelagið heldur hinvegin uppá, at teir skulu hava vanliga løn og at gjaldið fyri tilkallivaktin bara er galdandi um kvøldið og um náttina, uttanfyri vanligu ferðaætlan.

– Tá ið vit lýstu verkfallið, boðaðu vit samstundis frá, at netupp sjúkraflutningurin er ikki umfataður av verkfallinum, sigur Ellintur Abrahamsen.

Tí eru yvirmenninir á Teistanum og Ternuni framvegis umborð á skipunum, til reiðar at føra sjúklingar og læknar um Vestmannasund og Skopunarfjørð.

– Og tað verða teir verandi, tí Strandferðslan hevur heldur ikki lýst verkbann ímóti teimum.

– Men ger hon tað, mugu teir íland, men so eru teir samstundis heilt leysur av skipunum og so verður heldur ongin sjúkraflutningur, sigur Ellintur Abrahamsen.

Men so er tað Strandferðslan, ella fíggjarmálastýrið, sum hevur steðga sjúkraflutninginum og ikki vit.

Men hann leggur dent á, at meðan teir eru tøkir, skulu teir hava vanliga løn, hóast talan »bert« er um sjúkraflutning.

– Menninir fara ikki at verða tøkir til sjúkraflutning alt samdøgurið fyri ávikavist 17 og 34 krónur um tíman, leggur hann dent á. Teir skulu hava vanliga løn og vanligt gjald fyri tilkalling uppá 17 og 34 krónur uttanfyri vanligu ferðaætlanina.

– Antin eru teir umborð, ella hava teir heilt frí, so einfalt er tað.

Hinvegin legði Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum eina við í Útvarpinum sunnukvøldið, at hann fór ikki at gjalda monnum løn, sum ikki vóru til arbeiðis og at hann fór at halda seg til ta vanliga og betala teimum gjaldið fyri tilkalling.

Sostatt er framvegis ósemja um lønina og Ellintur Abrahamsen vísir ikki aftur, at málið kann enda í rættinum um menninir ikki fáa sáttmálasettu lønina.

Trý fólk møttu til konsert í Saltangará

– Listin og tónleikurin eru nógv ment á Skálafjørðinum seinastu árini, sigur Jóannes S. Hansen, sum samskipar tiltøk fyri Runavíkar kommunu.

TÓNLEIKUR OG LIST
Vilmund Jacobsen

Hóast bert trý fólk møttu á eini áhugaverdari konsert í býráðshøllini í Saltangará herfyri, heldur Jóannes S. Hansen, sum samskipar tiltøk fyri býráðið, ikki, at hetta merkir, at eingin áhugi er í kommununi fyri tónleiki.

Hetta kvøldið, sum var eitt hóskvøld, spældi Sámal Petersen á violin og ein íslendsk kvinna á klaver.

– Hetta var ein frálík konsert, sum bara trý fólk nýttu høvi at hoyra, og tað var stórt spell, sigur Jóannes.

Hann sigur, at Norðurlandahúsið og Konsertfelagið plaga at hjálpa til at skipa fyri tiltøkum í Saltangará, og onkuntíð syrgir hann sjálvur fyri, at tónleikur og annað er á skránni í býráðshøllini, sum hann heldur er væl egnað til tílík tiltøk.

Spurdur, hví so fá fólk møttu júst hetta kvøldið í Saltangará, sigur Jóannes, at helst mundi orsøkin vera hon, at fólk, sum plaga at møta til konsertir, høvdu onnur ting at takast við.

– Her hendir nógv í økinum, og fólk hava nógv at takast við, sigur hann.

Áhugafelag

Jóannes heldur, at tað kanska hevði verið eitt hugskot við einum felag, sum stuðlaði uppundir slík tiltøk sum konsertir og framsýningar av ymiskum slagi.

– Nøkur fólk kundu tikið seg saman og møtt upp saman, tá ið konsertir og eitt nú framsýningar eru á skránni. Hetta kundi verið eitt áhugafelag, sum t.d. hugnaði sær við drekkamunni, áðrenn tey fóru út saman. Somuleiðis kundi eitt slíkt felag verið saman um eitt hvørt størri tiltak einaferð um árið, t.d. ein døgurðabita á John's Restaurant, Elduvík ella á Muntra í Fuglafirði.

Spurdur, um hann kundi hugsað sær at tikið stig til eitt sovorðið felag, heldur Jóannes, at hann hevur nóg mikið at takast við sum er, men hann kundi væl hugsað sær at verið við.

Jóannes S. Hansen hevur verið organistur í Berøa síðan miðskeiðis í sekstiárunum, og seinastu 15 árini hevur hann havt kvøldskúla í málningalist, eitt nú í Saltangará, Strondum og í Fuglafirði.

Í vetur hevur hann undirvíst bæði á Strondum og í Fuglafirði.

Jóannes heldur, at bæði tónleikurin og málningalistin hava ment seg nógv í Eysturoynni seinastu árini, og tað fegnast hann um.

– Á hvørjum ári er tað onkur næmingur, sum eg havi havt í málninglist, sum sigur seg fara at halda fram at mála, og tað er hugaligt, sigur Jóannes S. Hansen.

Verður verkfallið drúgt, fyllast goymslurnar

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Á Sandoy Seafood hava tey úr at gera, hóast verkfall er, og fiskur ikki verður fluttur av gólvuppboðssøluni á Toftum og í Sandoynna.

Nornagestur landaði á Sandi mánadagin; teir høvdu 200.000 pund av upsa, meginparturin upsi 4. Kolumbus, sum partrolar við Nornagesti, hevði nøkunlunda tað sama. Teir landaðu til Fiskavirking á Tvøroyri.

– Hetta er nóg mikið til hesa vikuna, tí vikan er so stutt, sigur Jóan Petur Vest á Sandoy Seafood.

Hósdagurin, sum er flaggdagur, er hálvur arbeiðsdagur og fríggjadagurin, dýri biðidagur, er heilidagur.

Goymslurnar

Verkfallið ávirkar ikki rávørutilgongdina hjá Sandoy Seafood sum so, tí virkið keypir nógvan fisk beinleiðis um bryggjukantin.

– Men verður verkfallið ov drúgt, fáa vit ein trupulleika við goymslunum, bæði her á Sandi og í Skopun, sigur Jóan Petur.

Hann vísir á, at nú verkfallið varð lýst, hevði Sandoy Seafood væl av fiski á goymslu, og tí kann tað gerast trupult, um verkfallið dregur ov langt út.

– Eg dugi ikki at siga, hvussu leingi vit kunnu arbeiða uttan at kunna avskipa, men gerst tíðin ov long, steðgar framleiðslan upp. Fiskurin, vit keypa og virka til saltfisk og flak, má eisini útaftur, og sum er slepst ikki um Skopunarfjørð, sigur Jóan Petur Vest.

Fleiri línuskip landa hýsu í Miðvági

Kári á Presttrøðni, landingarformaður, sigur, at nú verkfall er, er avskipingin ikki nakar trupulleiki, tí øll framleiðslan á virkinum fer til frystingar.
– Men verður verkfallið drúgt, verður plásstrot, um eingin avskiping verður, sigur hann

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Líkt er til, at Fiskavirking í Miðvági er væl við í kappingini um hýsuna í løtuni.

Leygardagin landaði línuskipið, Mascot, 20.000-22.000 pund av hýsu í Miðvági. Teir høvdu roynt stutt og høvdu eisini annan fisk, eitt nú tosk. Mascot fór útaftur við restini av fiskinum, teir høvdu inni, og ætlaðu at royna nakrar dagar aftrat.

Mánadagin arbeiddi Fiskavirking í Miðvági hýsuna hjá Mascot og nakað av útróðrarfiski, sum virkið keypti á uppboðssøluni í Sørvági.

Tá ið Sosialurin frætti úr Miðvági, væntaðu tey tveir línubátar hjá Árna Dam seinni um kvøldið ella út á náttina.

Mikudagin kemur línuskipið, Venus, væntandi inn at landa. Teir hava verið stutt úti, og virkið í Miðvági keypir bara hýsuna.

Verkfallið

Nú verkfall er, fær Fiskavirking í Miðvági ikki keypt fisk á gólvinum, tí eingin flutningur er um Vestmannasund. Heldur ikki slepst av við lidnu vøruna, tí einki farmaskip siglir úr Vágunum.

Kári á Presttrøðni, landingarformaður, sigur, at avskipingin ikki er nakar trupulleiki beint nú, tí øll framleiðslan á virkinum fer til frystingar.

– Vit kunnu klára okkum uttan avskiping í ein mánaða ella so. Men verður verkfallið drúgt, verður plásstrot, um eingin avskiping verður, sigur hann.

Verkfallið rakar eisini sjónvarpið

Ætlanin hjá Sjónvarpi Føroya var at senda beinleiðis frá valfundum í Suðuroy, Norðoyggjum og Eysturoynni, men av tí, at verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum ger, at ongi strandfaraskip sigla, verður onki sent frá valfundinum í Suðuroy

SJÓNVARP
Ingrid Bjarnastein

Ístaðin fyri at fara til Hvalbiar, fer sjónvarpið til Vestmanna, har sent verður beinleiðis frá valfundi fyri Norðstreymoyar valdømi.

– Vit skuldu jú senda beinleiðis úr Roynhøllini í Hvalba, men av tí, at verkfallið var, so fingu vit ikki linkvognin suður við. Ístaðin fyri ætlaðu vit so at banda fundin, og síðani senda hann óbeinleiðis, men av tí, at tyrlan ikki slapp á flog í gjáramorgunin, so kunnu vit heldur ikki tað, sigur Tórður Mikkelsen frá Sjónvarpi Føroya.

– Tí fór sendingin frá Suðuroy púra í vaskið, men ístaðin fyri senda vit beinleiðis úr Vestmanna í kvøld. Eisini var meiningin, at vit skuldu senda beinleiðis úr Norðoyggjum, men tann fundurin verður ístaðin bandaður og sendur hóskvøldið. Men fríggjadagin verða vit í ítróttarhøllini á Kambsdali, og haðani verður sent beinleiðis.

Tórður Mikkelsen vísir á, at hetta er stórt spell, tí teir høvdu glett seg til hesar sendingarnar. Endamálið við sendingunum var at fáa ein lokalan dám, har politisku valevnini løgdu fram og fólk í salinum fingu høvi at seta spurningar.

Linkvognurin er ein bussur, sum er leigaður úr Danmark. Hann hevur serliga útgerð á takinum, sum ger tað gjørligt at senda via luftina, heim á støðina og síðani beinleiðis út til fólk.

Trivnaðarmál

- Nýggjur bústaðarpolitikkur
- Nýggjur barnapolitikkur
- Nýggjur eldrapolitikkur

Elin Lindenskov C
Javnaðarflokkurin
www.lindenskov.com